# Tungur moralur í tunnari krimi

Bøkur




*Krimiskaldsøgan »Gagnligt lív« er ein klók bók í støðum, men sjálv spenningssøgan hevur lyndi til at hvørva*




***Høvundurin William Smith hevur eisini givið krimiskaldsøguna »Gagnligt lív« út á donskum við heitinum »Organiseret liv«***

**Sum moralsk modernisering av føroyskum krimisøgum er *Gagnligt lív* ikki óáhugaverd, men sjálv spenningssøgan víkir í royndini**

UMMÆLI
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tað er at tamba tað í so langt at kalla nýggju krimiskaldsøguna *Gagnligt lív* eftir William Smith eitt nýbrot innan føroyskar krimibókmentir, tí har er stutt sagt ov lítið frammanundan at bróta úr. Heldur kunnu vit tosa um eitt moderna íkast til avmarkaðu føroysku krimitraditiónina, tí í *Gagnligt lív* síggja vit fleiri av teimum eyðkennum, ið hava gjørt sítt til, at nútíðar norðurlendskar krimisøgur hava fingið tak á einum óvanliga stórum lesaraskara seinnu árini: ein ung, indigneruð kvinna fær snevilin av skipaðum altjóða kriminaliteti, sum hon setur sær fyri at reka upp á ein hátt, sum fær søguna at líkjast samfelagskritikki.

Við dystopiskum undirtónum verður Hvalastøðin við Áir, sum er umbygd til altjóða privathospitalið Vita Hospital, miðdepil í søguni. Her heldur ein eirindaleysur handil við lívgøgnum hjá asiatiskum smábørnum lív í eini yvirstætt av læknum og ríkmonnum, sum eftir øllum at døma eru fullkomiliga kensluliga geld, tá tað ræður um at bjarga egnum skinni fíggjarliga og heilsuliga.

Í løtum er hetta umhvørvið óvanliga fasinerandi í øllum sínum óndskapi og psykopatiska stórlætisørskapi. Men frásøgupersónurn er neyvur, óvanliga neyvur. Og áðrenn hann yvirhøvur letur søguna fáa ferð á, verður ein lang frágreiðing rullað upp um ein robottkendan hermann, sum endar við at plaffa eina asiatiska familju niður, tí hann skal hava fatur á ungu dóttrini.

Langi prologurin ger, at eg sum lesari eri um at missa tolið, tí tað er ilt at fáa eyga á, hvagar hesin parturin av søguni ber. At gøgnini hjá gentuni skulu brúkast seinni, kundi eg kanska havt gitt, men kortini. Slíkar langrøkjutar síðusøgur vísa seg nevniliga tíverri at vera eitt gjøgnumgangandi eyðkenni fyri *Gagnligt lív*, har sjálv spenningssøgan av somu orsøk missir flogið við jøvnum millumbilum.

Eisini málsliga røkkur neyvleikin ofta niður í minsta málsliga smálut í brotum, har læknaliga fakmálið er so gjøgnumført, at tað beinleiðis er torført at skilja, hvat gongur fyri seg. Gamaní ger vísundaligi neyvleikin søguna autentiska, men tá málið harvið stirvnar og sjálv krimisøgan hevur lyndi til at hvørva, fert tú at ivast í, hvørji ørindi bókin í grundini hevur.

Sum ein kærkomin millumliður millum fremmanda umhvørvið og lesaran, kemur sjúkrarøktarfrøðingurin Lisbeth, sum má metast at vera høvuðspersónurin í søguni. Hennara moralska indignatión verður ikki bara eitt avgerandi haldpunkt hjá lesaranum men eisini veruliga drívmegin í frásøgnini, sum eftirhondini blívir ein lektia í moralskum tvístøðum og truplum støðutakanum.

Her vísir *Gagnligt lív* seg sum ein rættiliga væl umhugsað og stundum klók bók, sum dugir at venda og snara spurninginum um nýtslu av lívgøgnum uppá mátar, tey fægstu munnu hava hugsað um - bæði moralskt, filosofiskt, sosialt og fíggjarliga.

Samfelagskritisk byrja søgan tó ikki av álvara at eta seg inn á lesaran fyrr enn móti endanum, tá ein sera óunniligur friður aftur valdar, sum rykkir teppið undan okkara rættvísiskenslu. Til tá, er handil við lívgøgnum mest eitt leiktjald fyri eini heldur tilvildarligari og óskipaðari spenningssøgu. Og tað er í grundini spell, tí her hevði ein køn ritstjórnandi hond uttan iva kunnað syrgt fyri, at mong av øðrvísi frásøguhugskotunum komu betri til sín rætt.

Har *Gagnligt lív* eydnast best í sum frásøgn, hongur tað oftast saman við høvuðspersónaparinum Lisbeth og Magnus. Kemiin millum tey er ofta áhugaverd og málsliga situr dialogurin stundum væl, sæð í mun til ofta stirvna og »umsetta« málið í bókini annars. Eisini er tað lætt at kenna seg aftur í Lisbeth, sum hóast hon er eitt slag av hetju í bókini, ongantíð verður ov nógv av tí góða. Gjøgnum hana fáa vit á tankavekjandi hátt innlit í loyniligu sjúkrahúsverðina, og sum menniskja tosar Lisbeth uttan iva til ein sera breiðan lesararskara - eisini til tey, ið ikki vanliga lesa krimisøgur. Hesum fær bókin nokk eisini brúk fyri, tí sum krimiskaldsøga við einum altjóða tema, ið eisini er komin út á donskum, fær *Gagnligt lív* harða kapping.

---

William Smith, *Gagnligt lív*, Forlagið í Støplum, 2009
(Sonne Smith hevur týtt úr donskum)